FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-107_1.2
dags. 18-10-2010

Fiskimálaráðið
Bókbindaragøta 8
Postboks 347
110 Tórhavn

Viðv.: Uppskot til løgtingslóg um tilbúgving
Felagið hevur 10-09-2010 móttikið omanfyri nevnda uppskot til hoyringar. Uppskotið er viðgjørt á stýrisfundi 17-09-2010.

Fiskimálaráðið hevur sett hoyringsfreistina til 19-10-2010 og boða frá, at síðan verður nýtt og redigerað uppskot sent pørtunum til hoyringar.

Fyrireikingin av lógararbeiðnum
Felagið luttók á kunningarfundi um uppskotið á Hotel Hafnia 20-09-2010. Á fundinum vóru møtt umboð fyri partarnar á tilbúgvingarøkinum og var uppskotið kritiserað av flestu teimum uppmøttu. Serliga var funnist at manglandi samskipanini í tilgongdini við uppskotinum. Flestu á fundinum kendu onki til at uppskotið skuldi koma.

Havandi í huga fyrireikingararbeiði á tilbúgvingarøkinum fyri nøkrum árum síðani, har allir partarnir á økinum luttóku, sum tó steðgaði, er hugstoytt í hesum førinum, at ongin er eftirspurdur, fyrr enn eitt liðugt uppskot kemur til hoyringar.

Felagið metir, at partarnir, sum útinna sjálvt tilbúgvingararbeiðið, áttu at verið tiknir inn fyrr í tilgongdini. Talan er um eitt sera fløkt økið, har landsfyrisitingar, kommunur, løgregla, bjargingarfeløg o.o. skulu samstarva. Hetta krevur samskipan og konsensus ímillum partarnar.

Umráðandi er tí, í hesum fyrra hoyringsumfarinum, at allar viðmerkingar og uppskot til broytingar frá pørtunum verða viðgjørdar og tiknar við.

Lógaruppskotið
Felagið hevur annars hesar viðmerkingar til ásetingarnar í sjálvum lógaruppskotinum.

§6, stk. 1. Um landstýrisins heimildir og kostnað fyri kommunurnar

Her verður landstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum heimilaður, at áseta minstukrøv fyri innihaldi, stødd og vavi av kommunalu tilbúgvingini.

Fyri kommunurnar er umráðandi at tilbúgvingin er nøktandi. Umráðandi er tó, at krøvini til kommunala tilbúgvingarstigið ikki verða sett so høgt, at kommunurnar í

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

veruleikanum koma at taka sær av tí landstilbúgving, sum er ábyrgdin hjá landsmyndugleikunum.

Møguleiki eigur eisini at verða opin fyri at kommunurnar gera samstarvsavtalur við landsmyndugleikar og –stovnar um tilbúgving.

Í mun til basing av oljudálking á havinum, sum er skipað í havumhvørvisverndarlógini undir Innlendismálaráðnum, eru kommunurnar og landsmyndugleikin akkurát nú í einari tilgongd, at skipa eitt samstarv ímillum kommunu – og landstilbúgvingina. Hettar er serliga í mun til, hvør liggur inni við oljusperringum og øðrum tilfari, at basa oljudálking.

Grundarstøði undir hesum arbeiði, er at stórar vanlukkur og oljudálkingar krevja nógv tilfar, um hesar skulu basast. Vit eru, sum kunnugt, eitt lítið land. Tí er ógjørligt, at kommunurnar koma at liggja inni við øllum tilfari at basa einari ógvuliga stórari oljuvanlukku, har t.d. eitt oljuskip fer á land ella hol kemur á eina oljugoymslu og oljan lekur út.

Eitt samstarv ímillum kommunu- og landstilbúgvingina krevst tí, har landsmyndugleikin liggur inni við partinum av tilfarinum, sum krevst til størri vanlukkur.

§ 6, stk. 2. Um útbúgving av átaksmanning.

Felagið hevur fyrr peika á, at møguleiki eigur at verða hjá átaksmanning at taka aðrar góðkendar útbúgvingar, t.d. í Danmark ella øðrum av grannalondunum, í staðin fyri føroysku útbúgvingina. Hesar útbúgvingar eru fult á støði við tær føroysku og nýggjasta tilfar verður nýtt til venjingarnar.

§ 10. Um skipan av tilbúgvingini í kommununi.
Her verður ásett at hvør kommuna skal hava eina tilbúgvingar- og brunanevnd. Í nevndini skulu sita 3 kommunustýrislimir, ein átaksleiðari og eitt umboð fyri fútan.

Fyri smæstu kommunurnarhevur hettar við sær, at allir 3 kommunustýrislimirnir koma at sita í nevndini, ein átaksleiðari skal setast og at fútin skal møta á fundunum.

Hetta er úti av proportiónum í mun til lítla fólksliga tilfeingi á smæstu kommununum.

Felagið leggur tí upp til at viðariføra verandi skipan í brunalógini fyri smæstu kommunurnar, har tað er landsstýrið, í samráð við bygdarráðið, sum avgerð um kommunan skal hava eina tilbúgvingar- og brunanevnd.

"Kommunustýri" ella "kommunan"
Ì fleiri førum verður "kommunustýrið" nevnt í uppskotinum. Felagið leggur upp til í onkrum førum heldur upp til at nýta "kommunan". T.d. fer kommunustýri ikki vanliga

ikki út at sýna bygningar, sum nevnt í § 39, stk. 3. Tað verða í flestu førum kommunal starvsfólk, sum kommunan áleggur at gera hettar arbeiði.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo